# Sjúkrasystraskúlin skal flyta

**Um alt gongur eftir ætlan, fer Sjúkrarøktafrøðingaskúli Føroya at flyta í nýggj hølir í Jónas Broncksgøtu við ársenda**

SKÚLAFLYTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Orsøkin, til at skúlin skal flyta, er hon, at tá ið Mentmálaráðið í 2000 yvirtók skúlan frá Almanna- og Heilsumálaráðnum, var ein avtala gjørd, sum segði, at Mentamálaráðið innan fimm ár skuldi finna nýggj hølir til skúlan, tí Almanna- og Heilsumálaráðið hevði tørv á hølunum hjá skúlnum. Hesum hevur verið arbeitt við øll árini, men ikki fyrr enn nú er tað eydnast at finna hóskandi hølir.

### Slakar fýra hæddir

Hølini, sum Sjúkrarøktafrøðingaskúlin skal flyta í, eru í bygninginum, har sum Almannastovan og Matrikulstovan higartil hava búleikast í. Matrikulstovan kemur framvegis at halda til í bygninginum, meðan Almannastovan skal flyta út.

– Tað hevur verið ógvuliga trupult at finna hóskandi hølir, og tí hevur tað drigið út. Nú meta vit okkum at hava funnið góð hølir til skúlan, og talan verður um slakar fýra hæddir, sum Sjúkrarøktafrøðingaskúlin kemur at ráða yvir, sigur Kristianna Jacobsen, fulltrúi í Mentamálaráðnum.

Hon sigur eisini, at tey høvdu vónað, at hølini vóru klár hjá Sjúkrarøktafrøðingaskúlanum at flyta inn í til eftir summarfrítíðina, men soleiðis verður tíverri ikki. Í Mentamálaráðnum siga tey seg tó vóna, at tað verður klárt at flyta inn við ársenda. Eini 130 næmingar og 13 lærarar hava sína dagligu gongd á Sjúkrarøktafrøðingaskúla Føroya.




*Tað er í hesum bygninginum, har Almannastovan og Matrikulstovan higartil hava hildið til, at Sjúkrarøktafrøðingaskúli Føroya nú skal flyta inn í*
*Savnsmynd*

## Rætting

Í sambandi við greinar um ílegugransking, sum vóru í blaðnum týsdagin, skrivaðu vit av misgávum, at Hans Atli Dahl, ið granskar í ílegum á Odense Universitets Hospital, er vágbingur. Tað er ikki rætt, tí Hans Atli er úr Fámjin. Vit biðja Hans Atla um umbering fyri hetta mistak.

**tn**

BILROKT.fo BRÚKTIR BILAR TIL SØLU



VW Caravelle
2.5 TDI
Árg. 2003
Km. 68.000
Nú 275.000,-



MITSUBISHI
PAJERO 2.8
Árg. 1999
Km. 140.000
Nú 148.000,-



HONDA HRV
4x4 1.6 V-TEC
Árg. 2001
Km. 72.000
Nú 119.000,-



MAZDA
2.5 Turbo diesel 4x4
Árg. 2004
Km. 36.000
Nú 155.000,-

SEAT CORDOBA
1.9 Diesel
Árg. 1999
Km. 92.000
Nú 55.000,-

SUZUKI IGNIS
1.5i sport
Árg. 2005
Km. 20.000
Nú 129.000,-

HYUNDAI ACCENT 1.6i
Árg. 2003
Km. 40.000
Nú 79.000,-

DAEWOO LEGANZA 2.0i
Árg. 2002
Km. 70.000
Nú 129.000,-

DAEWOO TACUMA 2.0i
Árg. 2002
Km. 52.000
Nú 55.000,-

CITROEN ZX 1.4i
Árg. 1993
Km. 109.000
Nú 9.000,-

NISSAN PRIMERA 2.0 Diesel
Árg. 1998
Km. 192.000
Nú 55.000,-

BILRØKT
v/Jákup á Borg · Varðagøta 77 · FO-110 Tórshavn
tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo

i
Sosialurin

## ROKNSKAPUR 2005

| RAKSTRARROKNSKAPUR | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| | tkr. | tkr. |
| Rentuinntøkur v.m. | 417 | 169 |
| Vinningur av partabrøvum v.m. og øðrum kapitalpørtum | 10 | 30 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 6.414 | 4.921 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -150 | -250 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | 4.655 | 248 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 21.070 | 11.564 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **32.416** | **16.682** |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -14.290 | -9.241 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | -332 | -234 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -2.585 | -1.935 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **15.209** | **5.272** |
| Skattur | -3.059 | -1.036 |
| **ÁRSÚRSLIT** | **12.150** | **4.236** |

| FÍGGJARSTØÐA | 31/12-2005 | 31/12-2004 |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| Áogn hjá kredittstovnum v.m. | 29.702 | 10.444 |
| Lánsbrøv v.m. | 503 | 0 |
| Partabrøv v.m. | 2.671 | 5.203 |
| Óítøkiligar ognir | 415 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | 818 | 712 |
| Onnur ogn | 84 | 74 |
| Tíðaravmarkingar | 2.948 | 4.620 |
| **OGN TIL SAMANS** | **37.141** | **21.053** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR** | | |
| Onnur passiv | 6.149 | 2.710 |
| Tíðaravmarkingar | 1.227 | 728 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 10.000 | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 | 1.914 |
| Flutt úrslit til samans | 17.851 | 5.701 |
| **Eginpeningur til samans** | **29.765** | **17.615** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR TIL SAMANS** | **37.141** | **21.053** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| Ábyrgdir | 181 | 149 |

KAUPTHING Virðisbrævameklarafelag
Skrásetingar nr. p/f 2997

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F
Tinghúsvegur 14, Postboks 3090
FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 15 00, Fax +298 35 15 01
www.kaupthing.fo